**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 3/2026: Uppskot til løgtingslóg um serstakar fiskidagar til bólk 5 B fyri fiskiárið 2026**

Bárður á Steig Nielsen, landsstýrismaður í uttanríkis- og fiskivinnumálum, hevur lagt málið fram 3. august 2026, og eftir 1. viðgerð tann 5. august 2026 er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 13. august 2026.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Føroya Fiskimannafelag, Føroya Skipara- og navigatørfelag, Suðurstreymoyar útróðrarfelag, Føroya Ráfiskakeyparafelag og landsstýrismannin í uttanríkis- og fiskivinnumálum saman við Havstovuni og Vørn.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Ben Arabo, Atli F. Johansen, Árni Skaale, Erhard Joensen, Fía Selma Nielsen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Fiskidagarnir í bólki 5 B vóru uppi í august í ár, og uppskotið til løgtingslóg um serstakar fiskidagar til bólk 5 B fyri fiskiárið 2026 tillutar 750 dagar eyka til henda bólk í 2026.

Meirilutin tekur undir við uppskotinum at tilluta 750 dagar til bólk 5 B, men meirilutin heldur, at nøkur lýti eru í skipanini, sum landsstýrismaðurin eigur at broyta skjótast gjørligt.

Meirilutin heldur, at landsstýrismaðurin átti at javnsett bólkarnar 5 A og 5 B við hinar bólkarnar viðvíkjandi sokallaða buffaranum. Allir hinir bólkarnir hava ein buffara, sum er óbrúktu dagarnir frá árinum fyri, og ilt er at síggja nakað argument fyri, at bólkarnir 5 A og 5 B ikki skulu hava eina slíka skipan eins og hinir bólkarnir.

Í 2025 vóru 559 avreiðingar minni enn 150 kg. Um eitt minstamark fyri avreiðingarnøgd varð sett á 150 kg, áðrenn tað taldi sum ein fiskidagur, so vóru 559 dagar í fjør, sum ikki vóru nýttir. Meirilutin heitir á landsstýrismannin at áseta eitt minsta mark á 150 kg fyri hvørja avreiðing, um tað skal telja sum ein fiskidagur.

Ein trupulleiki, sum kann standast av støðuni í dag, er, at ov nógvir bátar flyta upp í bólk 5 A komandi ár. Tí heitir meirilutin á landsstýrismannin um at hækka markið fyri avreiðingarvirði frá 200.000 kr til eina meira hóskandi upphædd, fyri at kunna flokkast í bólk 5A.

Tað er umráðandi, at bólkur 5A, har yrkisútróðrarmenn verða flokkaðir, ikki fer at mangla dagar komandi ár.

Markið fyri arbeiðsinntøku afturat útróðrarvirksemi, sum verður í mesta lagi 150.000 kr. komandi ár fyri at kunna flyta úr bólki 5 B í bólk 5 A, eigur at hækkast til eina meira tíðarhóskandi upphædd. Meirilutin heitir á landsstýrismannin at broyta hetta mark.

Nevndin hevur fingið upplýst, at miðalavreiðingarnøgdin higartil í ár var 440 kg pr. dag. Um 750 dagar koma í skipanina afturat, og miðalnøgdin verður tann sama, so er talan um 330 tons. Tí verður ikki mett, at hetta fær stórvegis ávirkan uttanfyri bólk 5 B.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Eirikur í Jákupsstovu) hevur hesar viðmerkingar:

Eins og meirilutaálitið vísir, so er ongin grundgeving fyri at leggja 750 dagar afturat til bólk 5 B uttan tað, at dagarnir hjá bólkinum nú eru uppi.

Tað er greitt, at tað eru upp ímóti 350 bátar, sum hava verið aktivir í bólki 5 B í ár. 750 dagar til hesar 350 bátar gevur 2,14 dagar í part, og tí kann væl henda, at dagarnir eru brúktir, áðrenn septembermánaður er liðin. Um fleiri dagar skulu útlutast, hvørja ferð dagarnir hjá bólki 5 B eru brúktir, so er sera sannlíkt, at fiskidagar aftur skulu lutast út seinni í ár.

Í øðrum bólkum er støðan eisini soleiðis, at fleiri reiðarí kundu hugsað sær fleiri dagar í ár, tí tað gleðiliga er, at hóast toskastovnurin sambært stovnsmetingunum ikki er á einum nøktandi støði, so hevur ligið væl fyri at veiða tosk, samstundis sum prísurin hevur verið góður. Tað hevur við sær, at eyka dagar í flestu bólkum kundu givið eitt eyka fíggjarligt íkast her og nú.

Við at lata bólki 5 B fleiri dagar nú við grundgevingini um, at bólkurin hevur brúkt allar sínar dagar, metir minnilutin tað vera torført at grundgeva logiskt fyri, at fleiri dagar ikki skulu latast øðrum bólkum ella førum í øðrum bólkum, har dagarnir verða uppi.

Hinvegin stendur greitt eftir mestsum øllum hoyringarskrivunum og tí, sum er komið fram í nevndini, at hvørki reiðarafelagið, manningarfeløgini, fiskaseljarar, fiskakeyparar, aðrir partar av vinnuni ella Havstovan meta tað vera eitt gott hugskot at fara burtur frá umsitingarætlanini, sum er galdandi fyri fiskiskapin undir Føroyum, sum mann ger við at leggja 750 dagar afturat nú.

Ein høvuðsorsøk til, at fleiri hoyringarpartar mæla frá at samtykkja hetta uppskotið er, at umsitingarætlanin, sum vinna, vísind og politisk skipan grundleggjandi hava verið samd um, í løtuni er til ummælis hjá ICES. Við at broyta viðurskiftini í einum undirbólki, sum veiðir umleið 10 prosent av toskinum í vekt, harav ein lutfalsliga stórur partur er ungfiskur, meta partarnir tað gerast truplari hjá ICES at viðmæla umsitingarætlanina, soleiðis sum hon er. Heilt einfalt tí, at hon skipanarliga ikki verður vird.

Viðvíkjandi umsitingarætlanini er støðan hon, at tað í 2019 eydnaðist í samgonguni millum Javnaðarflokkin, Tjóðveldi og Framsókn at seta í lógina um sjófeingi, at umsitingarætlanir skulu gerast fyri stovnsrøktina og síðani at fáa semju millum allar partar um eina umsitingarætlan fyri tosk, hýsu og upsa undir Føroyum. Hetta var á fyrsta sinni, at vísindalig ráðgeving í samstarvi og undirtøku frá vinnu- og manningarfeløgum hevur verið fylgd fyri botnfiskastovnarnar undir Føroyum.

At umsitingarætlanin kann koma undir trýst, tá ið tað stendur á hjá ymsu bólkunum, og tá stovnsmetingar ganga skeivan veg, er sjálvsagt. Avgerandi er tí, at tá ið avbjóðingar og bráðfeingis støður koma, so verða tær viðgjørdar soleiðis, at semjan um umsitingarætlanina ikki verður slept.

Skulu broytingar gerast og lýti rættast, mugu teir ábyrgdarhavandi partarnir í umsitingarætlanini finna semjur. Harundir mugu umboð fyri útróðrarbátarnar í bólki 5 vera við - ið kanska ikki hava verið nóg væl umboðaðir í tilgongdini higartil.

Men við framferðini hjá landsstýrismanninum og samgonguni nú, tykist mest vera talan um “frá hondini í munnin” politikk, sum kann bróta niður semjuna og umsitingarætlanina, sum hevur kravt nógv stríð og áhaldandi arbeiði.

Tað hevur verið ført fram, at ætlaðu eyka dagarnir kunnu hava við sær, at eini 300 tons av toski afturat verða veidd, og at tað ikki koppar stovninum, og at hetta kann geva einar 10 milliónir krónur afturat í avreiðingarvirði hjá bólki 5 B.

Minnilutin metir tað vera eina heilt rímiliga meting, men merkir hendan veiðan, at ICES ikki kann viðmæla umsitingarætlanina og hetta tí fær avleiðingar fyri MSC-góðkenningina av upsafiskiskapinum eftir somu umsitingarætlan, sum fleiri partar í vinnuni bera ótta fyri, so er talan um at seta stór virðir í vanda.

Tað kemst av, at í nevndarviðgerðini er komið fram, at missir upsafiskiskapurin undir Føroyum MSC-góðkenningina, so er metingin, at mista útflutningsvirðið er fleirfalt metta útflutningsvirðið av veiðuni, sum kemur afturat í bólki 5 B. Hetta mista útflutningsvirðið verður tó í ár og hvørt komandi ár – og ikki bara í ár, sum møguliga íkastið av hesum uppskotinum avmarkar seg til.

Tað hevur somuleiðis verið ført fram, at hesir 750 dagarnir, sum lagt er upp til luta út afturat til bólk 5 B, natúrliga høvdu verið tøkir, um bólkur 5 hevði buffaraskipan sum hinir bólkarnir. Hetta er torført at skilja, tí buffaraskipanin í hinum bólkunum snýr seg um, at upp til 10 prosent av óbrúktum tillutaðum døgum í einum fiskiári kunnu brúkast árið eftir. Í 2025 var støðan til dømis soleiðis, at 6.808 dagar vóru tillutaðir bólki 5 tilsamans, meðan uppgerð hjá Vørn vísir, at 6.801 dagar vórðu brúktir. Sostatt høvdu 7 dagar verið at flutt til 2026, um buffaraskipan var fyri bólk 5 líka sum fyri hinar bólkarnar.

Av hesum orsøkum metir minnilutin, at tað hevði verið ein munandi betri loysn, at landsstýrismaðurin heldur seg til galdandi umsitingarætlanina og í staðin brúkti arbeiðsorkuna til at gera eina góða varandi skipan fyri bólk 5, heldur enn at koma við hesum uppskotinum.

Minnilutin er samdur við meirilutanum, at bólkur 5 hevur lýti í mun til veruligu støðuna hjá bólkinum, og at skipanin eigur at verða dagførd. Ein partur er at javnseta bólkin við hinar bólkarnar viðvíkjandi buffaraskipan, umframt at viðgera eitt minsta mark fyri, nær ein avreiðing telur sum ein dagur. Hartil tykist tað sum, at bólkur 5 í nógvum førum ikki hevur verið líka væl umboðaður í sjálvari viðgerðini, tá fiskivinnan undir Føroyum hevur verið skipað. Høvuðsdentur skal altíð leggjast á, at tað fyrst skulu vera góðar umstøður hjá teimum, sum liva av fiskiveiðu.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 24. august 2026**

| | | |
|---|---|---|
| Ben Arabo<br>formaður | Atli F. Johansen<br>næstformaður | Fía Selma Nielsen |
| Erhard Joensen | Árni Skaale | Eirikur í Jákupsstovu |
| | Steffan Klein Poulsen | |